## Færri fáa krabbamein

Í mong ár hava hagtølini hjá danska Heilsustýrinum víst, at altsamt fleiri danir hava fingið staðfest krabbamein, men nú vísa tey nýggjastu tølini, at gongdin er vend. Tølini hjá Heilsustýrinum vísa, at í 2007 vórðu 32.511 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir. Tað var heldur meiri enn árið fyri, men verður vøksturin í fólkatalinum tikin við í roknistykkið, er tann keðiliga gongdin steðgað, sigur Heilsustýrið. Hans Henrik Storm, sum er yvirlækni hjá danska krabbameinsfelagnum, sigur við DR, at tað er ov tíðliga at klappa enn, tí tað er neyðugt at kanna tølini í nøkur ár afturat, áðrenn tað ber til at siga við vissu, at gongdin er vend. Jakob Axel Nielsen, heilsumálaráðharri, fegnast um tey nýggju tølini og sigur seg vóna, at tann jaliga gongdin fer at standa við.



## Rentan niður í helvt

Danskir húsaeigarar, sum velja at umleggja síni húsalán nú um mánaðarskiftið, kunnu fáa rentuna niður í helvt. Realkreditráðið sigur, at rentan á húsalánum við skiftandi rentu varð seinast ásett á nýggjárinum. Rentan á hesum lánum fylgir teirri sokallaðu Cibor-rentuni, sum var umleið fimm prosent á nýggjárinum, men sum er umleið 2,5 prosent nú. Tí kunnu tey, sum umleggja síni lán nú, fáa rentuna niður í helvt, sigur ráðið. Danskir húsaeigarar og vinnufyritøkur hava lænt umleið 450 milliardir krónur við skiftandi rentu, og tann 1. juli lækkar rentan á lánum fyri 180 milliardir krónur, sigur Realkreditráðið sambært Ritzau.

# Michael Jackson er deyður

**Kongurin av pop er deyður. Michael Jackson varð funnin lívleysur í heimi sínum og varð fluttur á eitt sjúkrahús í Los Angeles, men lívið stóð ikki at bjarga. Sostatt missur heimurin ein av teimum størstu artistunum**



TÓNLEIKUR

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Michael Jackson er deyður.

Deyðsboðini vórðu givin klokkan 14.26 lokala tíð, ið er klokkan 22.26 føroyska tíð, á UCLA-sjúkrahúsinum í Los Angeles.

Hildið verður at popstjørnan fekk eitt hjartaslag í heimi sínum. Lækni hansara var til staðar og royndi uttan eydnu at fáa lív í hann aftur, upplýsti bróður Michael, Jermaine, á einum tíðindafundi í nátt.

Ein sjúkrabilur varð tilkallaður, og á veg til sjúkrahúsið varð roynt at fáa lív í Jackson afur.

- Tá hann kom til sjúkrahúsið klokkan 13.14 (21.14 føroyska tíð), royndi eitt læknatoymi, herímillum skaðastovulæknar og hjartalæknar, at fáa lív í hann aftur. Henda royndin stóð við í meir enn ein tíma. Tað eydnaðist teimum ikki, segði ein týðuliga rørdur Jermaine Jackson á tíðindafundinum.

Í dag skal eitt líksýn staðfesta, hvør deyðsorsøkin var.

Ein talsmaður hjá familjuni, Brian Oxman, sigur við sjónvarpsstøðina CNN, at Michael Jackson fekk reseptheilivág orsaka av skaðum, hann hevði fingið undir venjing av pallframførsluni. Fyri CNN legði Oxman upp til, at deyðsorsøkin kundi vera ein yvirdosis av heilivági.

### Var á veg fram aftur

Seinastu tíðina hevur Michael Jackson verið í Los Angeles, har hann hevur fyrireikað seg til sínar comeback-konsertir í London. Hann er tó sæddur fleiri ferðir koma inn og út av sjúkrahúsinum.

Tí hevur nógv verið gitt um heilsustøðu hansara, og comeback konsertirnar, ið nógv hava bíðað eftir í spenningi, eru útsettar.

### Stjørna longu sum barn

Michael Jackson varð longu sum barn kendur, tá hann var við í Jackson 5. Seinni varð hann kendur sum King of Pop, Kongurin av Pop, tá hann sum soloartistur gav plátunar Off The Wall, Thriller (ið enn í dag er heimsins mest selda fløga nakrantíð) og Bad, ið vóru fyltar við hittum.

Men við síðunaav stóru tónleikaligu framgongdini, lærdi heimurin eisini ein annan Michael Jackson at kenna. Fleiri vakurleikaskurðviðgerðir góvu popkonginum eina mystiska nøs, høkuskarð og eina nógv bleikari húð. Egnu frágreiðingarnar hjá Jackson til nógv broyttu útsjóndina vóru, at hann varð skaddur av fýrverki undir upptøku til eitt videolag.

Hann hevur eisini verið gjøgnum fleiri uppslítandi rætarmál, har hann er ákærdur fyri at hava samband við ómyndigar dreingir. Hann hevur eisini verið giftur við dóttir ein annan kong, Elvis.

Í nógv ár búði hann í Neverland – ein samanrenning av leikalandi og bústaði. Hann hevur selt milliónir av plátum, men hevur vunnið mest pening upp á at eiga rættindini til fleiri Beatles sangir.

Michael Jackson varð 50 ár.

# Sosialurin treiskast blaðkreppu

**Sosialurin hevur í gjár havt aðalfund. Hóast kreppa er um allan blaðheimin, megnaði Sosialurin at fáa yvirskot á góðar 2,2 milliónir krónur fyri 2008**

BLAÐVINNA

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur í gjár havt aðalfund. Endaliga ársúrslitið hjá felagnum í 2008 var eitt avlop á 2.210.403 krónur, ið er eitt vet minni enn í 2007. Í 2007 var úrslitið 2.329.000 krónur. Eginpeningurin hjá Sosialinum var við árslok í 2008 8.782.045 krónur.

Sostatt hevur Sosialurin megna at treiskast kreppuna í blaðheiminum, sum serliga kom í triðja ársfjórðingi av 2008.

Í viðmerkingum til roknskapin sigur leiðslan seg vera nøgda við úrslitið, sum tó varð ávirkað av búskaparniðurgongdini, sum gjørdi vart við seg síðsta ársfjórðing í fjør. Víðari verður sagt, at rakstrarúrslitið ætlandi verður munandi betri í 2009.

Hartil vísir leisðlan á, at tað er av alstórum týdningi fyri privatu miðlarnar, at aðalorðaskiftið um Kringvarpið og fjølmiðlaøkið sum heild kemur at viðføra greiðar karmar fyri partarnar á marknaðinum at virka undir.

Í dag hevur hitt stóra føroyska blaðið, Dimmalætting, aðalfund.

Á aðalfundinum varð nevndin víðkað, so hon nú telur sjey limir.

Nýggjur nevndarlimur er Ole Sloth, sølustjóri hjá Ekstrabladnum í Danmark.

Hinir nevndarlimirnir eru:
Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Eirikur Lindenskov
Jonhard Hammer
Jákup Mørk
Jóhanna Vang
Jan Müller, ið eisini er stjóri felagsins